# Íðkaranevnd

## *Reglugerð*

**Grein 1 - Heiti:**
*Stk 1:* Ítróttasamband Føroya hevur Íðkaranevnd í samsvar við reglugerð hjá IOC.

**Grein 2 - Endamál:**
*Stk 1:* Nevndin skal umboða sjónarmiðini hjá teimum aktivu íðkarunum og er ráðgevandi hjá starvsnevnd og undirnevndum ÍSF og Úrval í viðurskiftum hjá úrvalsíðkarum.

*Stk 2:* Nevndin hevur fimm limir og verður mannað við einum umboði fyri Parasport og fýra umboðum fyri hini sambondini. Javnstøða skal vera í nevndini.

**Grein 3 - Val:**
*Stk 1*: Valrætt og valbæri hava tey ítróttafólk, sum eru fylt 18 ár og hava umboðað teirra ítróttagrein í millumtjóða ella altjóða kappingum í seinasta lagi seks ár undan uppstilling til val í nevndina.

*Stk 2:* Millumtjóða og altjóða kappingar eru at rokna: HM, EM, NM, Oyggjaleikir og kappingar, sum altjóða sambandið skipar fyri.

*Stk 3:* Sambondini seta fram uppskot um nevndarlimir. Sambond kunnu innstilla upp til tvey umboð hvør, tó við teirra treyt, at tey tvey umboðini tá hava hvør sítt kyn.

*Stk 4:* Íðkarar kunnu sjálvir stilla upp. Hertil krevst 10 stillarar, sum sjálvir hava valrætt.

*Stk 5:* Eru færri enn fimm íðkarar, sum stilla upp, kann starvsnevndin velja valevni, sum uppfylla treytirnar í grein 3, stk. 1 og 2. Sama er galdandi um eingin er, ið stillar upp fyri Parasport, og um færri enn tvey eru uppstillaði av eina kyninum.

*Stk 6:* Fyrisiting ÍSF skipar valið sambært reglugerð.

**Grein 4 - Valskeið:**
Valskeiðið er fýra ár. Tó val annaðhvørt ár so at hvørji tvey ár eru ávikavist tveir og tríggir nevndarlimir fyri vali.

**Grein 5 - Innanhýsis skipan:**
Nevndin skipar seg sjálv við formanni og varaformanni og skrivara. Formaðurin fær sæti í starvsnevnd ÍSF

*Stk 2:* Hildnir verða í minsta lagi fýra fundir hvørt ár, og gerðabók verður førd. Fyrisiting ÍSF er nevndini til hjálpar.

*Stk 3:* Tá ið atkvøtt verður, er vanligur meiriluti galdandi. Stendur á jøvnum í atkvøðugreiðslu er atkvøða formansins avgerandi.

*Samtykt á aðalfundi 29. mai 2021.*